**<u>Tíðindaskriv til kirkjur og samkomur í Føroyum</u>**

Føroyar

# "Atlantic Bike Meet"

***Tað er nú skjótt eitt ár síðani kristiliga motorsúkklufelagið "Holy Riders MC Føroyar" varð sett á stovn. Tað gleðiliga er, at í dag eru tað 20 limir í felagnum, sum hetta tíðarskeiðið hevur verið sera virkið við m.a. kunnandi møtum um felagið, útdeiling av Biker-Bíblium við ymisk høvi, har MC-fólk hittast, eins og luttøku á Flaggdagshaldinum, og nú stendur so komandi "Atlantic Bike Meet" fyri durum. Stevnan verður hildin inni í Kelduni, Skálafjørður og verður hon karmur um øll tey tiltøk, ið verða har inni.***

Tað er á fyrsta sinni at eitt tílíkt kristiligt motorsúkklutreff verður hildið. Tað gleðir okkum her Holy Riders MC Føroyar at fáa vitjan av kristnum bikarum úr Norðanlondum, umframt at allir limir í virkandi MC-feløgum í Føroyum verða við. Hesi feløg eru nú fleiri í tali, t.d. Føroya MC-felag, Norðoya MC-felag, Eysturoyar MC-felag, Blue Berits og í suðri Storm Boys. Øll hesi felag hava á felags fundi játtað at luttaka á hesum treffi, har skráin verður sera blandað.

Úlendingarnir koma higar við Norrønu úr Bergen 28. juni kl. 15.00, har síðani móttøka verður í Gamla Kommunuskúlagarði og borgmeistarin Heðin Mortensen kemur at bjóða vælkomin, umframt heilsur, sangur o.a. verður skránni. Verður veðrið til vildar, verður eisini bjóðað kaffi, kakao og annað gott til góman fyri øll, ið áhuga hava.

Hósdagurin er settur av til "sight-seeing" og vitjanum ymsa staðni í landinum. Fríggjadagin kl. 13.00 verður stevnan sett inni í Kelduni. Talan verður um eitt treff, har MC-fólk hittast og hugna sær saman, men eisini tað andliga verður sera høgt raðfest við m.a. andaktum, sangløtum og bíbliutímum, har týskarin "Mondo", vanliga kallaður Kornelius Novak, kemur at hava ábyrgdina av boðskapinum. Eisini koma aðrir at deila orð Guds til luttakararnar.

Eitt, sum hoyrir til eitt MC-treff, er grilling, bæði á stevnuøkinum, og niðri á sandinum í Skálafirði, har eisini sangur og annar hugni verður. Togtogan og onnur spøl verða eisini at uppliva.

Leygardagin verður skipað fyri felags súkklutúri norður til Viðareiðis via Shell-støðirnar í Gøtudali, og á heimferðini á Shell-støðini í Klaksvík. Leygarkvøldið kl. 21.00 endar stevnan við stórari gospelkonsert í Kelduni, har Eyðun Jacobsen v/familju, Magni Christiansen, Sofus Hansen og systrarnar Vanja., Laila og Barbara koma at luttaka.

Sunnudagin talar Kornelius Novak á morgunmøtinum í Kelduni og sunnukvøldið talar hann í Evangeliihúsinum í Havn. Stevnan endar við stórari skrúðgongu í gjøgnum havnargøtur, har eisini høvi verður at deila út Biker-Bíbliur og annars vitna og syngja um Jesus.

Útlendingarnir fara avstað aftur við Norrønu mánamorgunin kl. 09.00.